# HEILSANIR



Birgit góða, nervarnir á tær vóru betur fyri 20-árum síðan, enn tá vit aftur skuldu royna somu modell uppsetan summari 2003 á byrgingini yvir Vestmanna. Tillukku við teimum 40 árunum.
**Ynskja maður tín og døturnar**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum í morgin. Vit sakna teg nógv.
**Sunniva, Kjartan og Selma**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á einhvønn hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 27. sept. 2003 ógloymandi.
**Joan og Mortan**



**Góða elskaða langomma**
Hjartaliga tillukku við degnum 15. jan. og takk fyri dagarnar í Havn. Heilsa ommididd.
**Suffía og Marin**



**Góða Birgit-gumma**
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum 15. jan. Alt tað besta.
**Ynskja Anita og Sólvá**



**Góða elskaða Marjun**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta í framtíðini ynskja vit øll.
**Sólrun og Hildur**

**Góða Anja Petursdóttir**
Hjartaliga tillukku á 5 ára føðingardegnum 20. jan. Eisini ein heilsan til Martin.
**Kærar heilsanir omma á Orknoyarveg 5**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við 34 ára degnum 17. jan, og alt tað besta ynskja vit tær í framtíðini. Vit elska teg.
**Heilsan Hans Erland og mamma**





**Góði Aleksandur**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag.
**Ynskja omma, abbi og gumma**



**Góði elskaði Aleksander**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 17. januar.
**Ynskir mamma**



Kettlingur burturblivin 14. jan. Hevur bústað Millum Gilja 27. Um nakar hevur sæð hann, vinarliga ringi **Tlf. 229044**



Hesin maðurin fyllir 42 ár í dag. Sær hann ikki ungur úr? Hjartaliga tillukku við degnum. Tillukku.
**Xxxxxx**



**Góða elskaða Hildur**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 16. jan. Alt gott í framtíðini ynskja vit øll.
**Sólrun og Marjun**


**BRÚKTIR RADIATORAR**
Tveir dupultir radiatorar stødd 250 cm x 44 cm til sølu fyri 400,- stykki. Tað ber væl til at keypa einans tann eina.
*Tlf. 314199 og 214999*

**FERÐAST SAMAN?**
At ferðast saman úr Danmark 22. januar.
*Tlf. 317061/+45 36752373*

**FLIPPER SPÆLIMASKINA**
Pinball spælimaskina til sølu fyri 4.000,- Í góðum standi.
*Tlf. 219383*

**TIL SØLU**
Venjingarbonkur til sølu fyri kr. 1.500,- Paraboldiskur til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 262903*

**MOTOROLA-TELEFON**
Motorola MCR 4800 XL ynskist (bara hornið, er eisini o.k.).
*Tlf. 219103*

**FARTELEFON**
SMS Chatboard óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx model. Góð til m.a. sms, telefonbók v.m. fyri 150 kr. (+frakt)
*Tlf. 0045 86428627/ 0045 26747474 (eisini sms)*

**UPPLADARI**
Uppladari til Ericsson 626 óbrúkt við antennu til sølu fyri 100 kr. (+ frakt).
*Tlf. 0045 86428627/ 0045 26747474 (eisini sms)*



## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

**Gudstænastur 2. sunnud. eftir trettandi**
*Gøta:* kl. 12, altarg., Martin R. Jacobsen
*Elduvík:* kl. 12, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs
*Vágur:* kl. 11, Patrick de Neergaard
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Sørvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Petur Martin Rasmussen
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Hattarvík:* kl. 12, altarg.,
*Kirkja:* kl. 17, Elsa Funding
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Vestmanna:* kl. 12, altarg., Marjun Bæk
*Haldórsvík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Kvívík:* kl. 12, Mogens T. Christensen

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evanegl. møti. Øll eru vælkomin.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði, kl. 20 Sangvenjing.
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Hendrik T. Olsen. Evnið: Kærleiki, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanl. støðunum, kl. 18 Møti v/ Sigurd Sørensen.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 smáskótar, kl. 19 stórir skótar.

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens – har nógv spennandi er á skránni.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt (fyri m.a. løgtingsvalinum).
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jórun og Nurlan.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Evni: Endurføðingin – at verða Guds barn. 2. partur. Talari: Regin við Skipá, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Sjónvarpsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum. leygarkvøldið 17. januar kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti har Jógvan Z. talar um evnið: Nýtt ár – nýggj byrjan.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er Signing av børnum. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um Samkomurnar í Opinberingini – Hvat Kristus sigur Lívdini.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jústines Ejdesgaard.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 verður sunnudagsskúli. Kl. 12.00 verður eisini møti har Virgar Hvidbro talar.
Mánakvøldið kl. 19.00 byrjar ungdómstiltakið aftur.
Hetta tiltak er ætlað ungdómi (5.-10. flokk). www.hebron.fo

**Nazaret í Kaldbak**
Á møtunum fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 tala Jákup Olsen og Poul Førø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Zion, Kollafjørður**
Leygarkvøldið 17. januar kl. 20 verður Ungdómsmøti í Zion í Kollafirði. Ung úr Gøtu luttaka. Drekkamuður verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vestmanna**
Missiónsvikan heldur áfram í kvøld kl. 20 við fólki av Sandoynni við talu og sangi.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við fólki av Sandoyni við talu og sangi. Innsavnan.
Bønarmøti er 1/2 tíma undan hvørjum møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, Sveinbjørn Jakobsen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Tjørnuvík.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Símun Jacobsen.
Mánadagin kl. 17.30 verður Tim 5 og kl. 20 Ungdómsmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula og Jastrid Høj. Barnamøti kl. 11, evangel. møti kl. 19. Vælkomin í kelduna. www.keldan.fo

**EB-húsið á Eiði**
Evangel. møti verða í EB-húsinum á Eiði leygarkvøldið 17. januar kl. 20 við luttøku úr Tórshavnar Hvítusunnusamkomu. Herman og Gigga syngja.
Sunnudagin kl. 16 við luttøku Tórmund og fleiri.

**Nerija á Skála**
Á møtinum sunnudagin kl. 17 tala Levi og aðrir. Sangkreftir úr Ebenezer luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Evnið verður »Teldan, sjónvarp, fartelefon…og Jesus« v/ Hans Kristian. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og møti verður kl. 18.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunudagin kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Øssur Steinhólm, kl. 21 Ungdómsmøti við Bergur Debes Joensen.

**Missiónsvika í Leirvík**
Mikudagin 21. januar kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Harry Hansen, Toftir, Effata syngur.
Hósdagin 22. kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Sylverius Jacobsen, Skála, Glyvrakórið syngur.
Fríggjadagin 23. kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Niels Jacob Nielsen, Strendur. Sangkreftir úr Leirvík syngja, innsavnan til Heimamissiónina.
Leygardagin 24. kl. 10 Bíbliutími við Jørmund Foldbo, Leirvík. Evnið: At byggja brýr, kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Hans Kristian Johannesen, Skála, Gleði syngur.
Sunnudagin Gudstænasta v/ altargongd kl. 12 v/ Una Næs, presti, kl. 15 Sunnudagsskúli við Annelisu Berthelsen, Strendur, Barnakór syngur, kl. 18.30 Bønarmøti, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen, Leirvík. Thaborkórið syngur.
Innsavnan til Missiónshúsið.
Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti, prædikumaður úr India talar.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Jonna Johannsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Glora**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Andreas Nýggjagarð.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Sámal Hanna Lognberg, kl. 18 einki møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna túrin til Vestmanna.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Irenu og Eyðun Christiansen, ið syngja og tala. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eingrím Holm talar.

**Sion,Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Blákrossfelagið Lamba, Skipanes og Søldarfjørður**
Blákrossveitsla verður 18. januar kl. 18 í Bønhúsinum í Søldarfirði. Øll eru vælkomin.

## BRÚDLEYP

29. desember *giftust* í Hósvíkar kirkju Anny Grettirsdóttir og Eyðolv Joensen, Hósvík.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 17. februar hava hjúnini Ruth og John Myllhamar í Sandavági verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, vera vinarliga biðin at siga frá áðrenn sunnudagin 8. februar á tlf. 333399 ella 533399.

Tann 16. februar hava hjúnini Julianna og Davis Didriksen verið gift í 25 ár. Sama dag verður Julianna 75 ár. Dagurin verður hildin 14. februar í Pálsstovu. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, kunnu ringja tlf. 312552 ella 508870 áðrenn 7. februar.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 17. januar Runavík tlf. 44 80 16
Sunnudagin 18. januar Runavík tlf. 44 80 16

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Luk. 19, 10: Tí at menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og at bjarga tí.*

Yvirtollarin Sakeus er lítil av vøkstri. Fyri at sleppa at síggja Jesus rennur hann undan tí stóra skaranum, sum fylgir honum, og klívur upp í eitt morberjatræ. Har heldur hann, at hann kann sita trygt krógvaður og væl fyri at síggja, tá ið Jesus kemur framvið. Einki verður sagt okkum um, hvat Sakeus ætlar við hesum. Harafturímóti hoyra vit, at Jesus steðgar, tá ið hann sær hann og hansara neyð. Við at bjóða sær sjálvum inn til Sakeus at gista vísir Jesus honum, at hann fagnar eisini honum, hvussu hann annars er vorðin, og at hann vil fyrigeva honum. Henda móttøka, henda góðkenning er beint tað øvugta av tí, Sakeus er vanur at møta frá bygdafólki sínum. Tey verða øll illa við, tí Jesus nú er farin inn hjá einum syndigum manni at gista. Hevur ein felagsskap og lut við ein syndara, so kemur hansara syndiga levnað at smitta av upp á ein sjálvan, halda tey.

Men at Jesus soleiðis kemur inn til yvirtollaran, tað vendir upp og niður á tilveru hansara. Framman fyri Harranum - og hvør veit: kanska eisini alment framman fyri øllum tí skaranum, sum uttan iva stendur uttanfyri og bíðar - stígur Sakeus fram og ger upp við sína synd. Hann vil geva teimum fátæku helmingin av ogn síni, og hann vil lata alt tað ferfalt aftur, sum hann av órættum hevur tikið ov nógv í arbeiði sínumm. Sakeus hevur møtt Jesu ófatiligu fyrigevandi náði, og lív hansara verður nýtt. Frelsa hevur verið húsi hansara fyri, tí at menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og bjarga tí.

Er stórt og fult mítt syndamál,
tó størri er Guðs náði;
um leið er dimm, og rás er hál,
fullvæl eg fram tó nái;
tí Guð mín góður hirði er,
sum alt sítt fylgi ræktar her
og bjargar tí úr vanda.

**Jákup Reinert Hansen, prestur**